From: Rúna Fossdal Guttesen
To: Fíggjarmálaráðið
Cc: Birta Biskopstø
Subject: Hoyringssvar - Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eftirløn (Eftirlønarlógin)
Date: 24. september 2025 16:46:41
Attachments: image001.png
image002.jpg

Til Fíggjarmálaráðið,

Taks hevur hesar viðmerkingar til uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eftirløn (eftirlønarlógin):

Til nr. 5 - § 2, stk. 10:
Orðingin kann skiljast soleiðis, at ongin eftirløn skal roknast um B-inntøka er minni 500 kr. Ætlanin er at ongin eftirløn skal rindast, um eftirlønargjaldið er minni enn 500 kr. Taks mælir til at nágreina orðingina.

Til nr. 14 - § 9, stk. 10:
Ásett verður, at eftirlønarveitari kann flyta útgjald á depotkonto, ið ikki fær tilskrivað avkast. Taks mælir til at tað verður nágreina, at talan ikki er um depotkonto hjá Taks sbrt. § 16a í eftirlønarlógini, men at talan má vera um depotkonto hjá eftirlønarveitara.
Harafturat metir Taks, at tað eigur at verða ásett, hvussu eftirlønarveitarin skal gera býtið av útgjaldinum millum kapitalútgjald, lutaeftirløn og lívlanga veiting. Valið, sum samansparari eigur at gera sambært § 9, stk. 2 í lógini.
Taks gongur út frá, at eftirlønarveitari í nevndu førum skal rinda útgjald mánaðarliga umvegis afturhaldsskipanina sbrt. § 9, stk. 6 í lógini.

Vinarliga

Rúna F. Guttesen
ráðgevi
tel. 352743

Postrúm 2151, 110 Tórshavn
www.taks.fo, taks@taks.fo, tel. 35 26 00

Fyrivarni
Ert tú ikki rætti móttakari av hesum teldubrævi, vinarliga sig mær frá og sletta brævið.

Notice
Please notify me and delete this e-mail and its contents if you are not the intended recipient of this e-mail.

Fra: Fíggjarmálaráðið <fmr@fmr.fo>
Sendt: mikudagur, 17. september 2025 15:56
Til: Fíggjarmálaráðið <fmr@fmr.fo>; Almanna- og mentamálaráðið <ammr@ammr.fo>; AV Almannaverkið <av@av.fo>; kf@kf.fo; Kundatænastan á TAKS <taks@taks.fo>; Tryggingareftirlitið <tryggingareftirlitid@tryggingareftirlitid.fo>; fafelag@fafelag.fo; industry@industry.fo; betri@pensjon.fo; Gjaldstovan <gjaldstovan@gjaldstovan.fo>; liv@liv.fo; Landsbanki Føroya <landsbankin@landsbankin.fo>; lp@eldri.fo; samtak@samtak.fo; Ann Ellingsgaard <ann@samstarv.fo>; osn@betri.fo
Cc: Ruth Vang <Ruth@fmr.fo>; Bjarni Askham Bjarnason <bab@fmr.fo>; Tórir Michelsen <Torir@fmr.fo>
Emne: Til ummælis: uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eftirløn (Eftirlønarlógin)

Hey aftur

Nú er uppskotið viðheft.

Vinaliga / Kind regards

Bára Michelsen
Samskipari / Coordinator

Office: +298 352020
Mobile: +298 552030
bara@fmr.fo

Fra: Fíggjarmálaráðið
Sendt: 17. september 2025 15:18
Til: Almanna- og mentamálaráðið ; AV Almannaverkið ; 'kf@kf.fo' ; Kundatænastan á TAKS ; 'tryggingareftirlitid@tryggingareftirlitid.fo' ; 'fafelag@fafelag.fo' ; 'industry@industry.fo' ; 'betri@pensjon.fo' ; Gjaldstovan ; 'liv@liv.fo' ; Landsbanki Føroya ; 'lp@eldri.fo' ; 'samtak@samtak.fo' ; 'Ann Ellingsgaard' ; 'osn@betri.fo'
Cc: Ruth Vang ; bab@fmr.fo; Tórir Michelsen
Emne: Til ummælis: uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eftirløn (Eftirlønarlógin)

Góðan dagin

Hjálagt verður sent tykkum uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eftirløn (Eftirlønarlógin) til ummælis.

Uppskotið er sent beinleiðis til:

- Almanna- og mentamálaráðið

- Almannaverkið
- Kommunufelagið
- TAKS
- Tryggingareftirlitið
- Føroya Arbeiðarafelag
- Føroya Arbeiðsgevarafelag (Vinnuhúsið)
- Betri Pensjón
- Felagið Peningastovnar
- Gjaldstovan
- Lív
- Landsbankin
- Landsfelag Pensjónista
- Samtak
- Fakfelagssamstarvið

Endamálið við lógaruppskotinum er at lætta um umsitingina av eftirlønarlógini fyri borgarar, vinnufyritøkur og TAKS.
Harafturat er eitt endamál at betra um langtíðarhaldførið í føroysku penssjónsskipanini sum heild.
Í uppskotinum til broytingar í eftirlønarlógini eru tilsamans 15 broytingar, sum mælt verður til at gera í eftirlønarlógini:
1. Í § 1, stk. 4 verður skal ikki broytt til kann ikki.
2. Frítøka fyri persónar, sum flyta til Føroya í sambandi við tíðaravmarkað starv, verður strikað. Heimild verður at rinda út aftur samansparing í staðin - § 1, stk. 5 í eftirlønarlógini.
3. Depotkontur - § 1, stk. 8 í eftirlønarlógini.
4. Nágreinað verður í § 2, stk. 8, at talan er um ein triðing av eftirlønargjaldinum eftir skatt.
5. Markið fyri, nær TAKS skal senda eftirlønarkrav av B-inntøkum hækkar til 500 kr.
6. Í § 2 verður sum stk. 11 sett: “Stk. 11. Skuldkomið eftirlønargjald fellur burtur, tá ið eftirlønarsamansparari nær fólkapensjónsaldur sbrt. lóg um almannapensjónir, ella tá ið eftirlønarsamansparari doyr.
7. Fylgibroyting orsakað av broyting í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk. § 13 a er sett inn í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk eftirfylgjandi.
8. Rætting í eftirlønarlógini og fylgibroyting av, at heitið á løgtingslóg um viðbót til ávísar pensiónistar er broytt.
9. Fylgibroyting av, at løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2020 um almannatrygd og tænastur varð sett í gildi 1. januar 2021, og av at samstundis varð sett úr gildi lov nr. 56 af 15. marts 1967 for Færøerne om offentlig forsorg.
10. Fylgibroyting av, at løgtingslóg um stuðul til uppihaldspening er sett úr gildi.
11. Heimild til at persónar, sum hava eftirlønarskipan uttanlands, sum tó ikki rinda lógarkravdu upphæddina til ta skipanina, kunnu rinda munin í Føroyum.
12. Útgjald skulu byrja mánaðin eftir, at eftirlønarsamanspararar náa fólkapensjónsaldri sbrt. lóg um almannapensjónir, tó við undantøkunum í stk. 5 og 9.
13. Ásett verður, at upplýsingar um kontonummar og peningastovn, har ið samansparda eftirlønin skal útgjaldast á, skulu vera við í fráboðanini til TAKS um, hvussu og nær samansparda eftirlønin skal útgjaldast.

14. Ásett verður, at eftirlønarsamansparari skal lata eftirlønarveitara upplýsingar um peningastovn og kontonummar, har ið samansparda eftirlønin skal útgjaldast á. Eftirlønarveitari kann flyta útgjaldið á depotkonto, ið ikki fær tilskrivað avkast, um upplýsingarnir ikki eru latnir eftirlønarveitaranum. Eftirlønarveitari kann eisini flyta útgjald á sentrala, løgliga góðkenda, almenna konto hjá eftirlønarsamansparara, sum er tilknýtt Vanganum, tá ið hesar væntandi eru liðugt mentar frá 2028.
15. Heimild at flyta eftirløn ella savna saman eftirløn hjá einum veitara - § 10 stk. 3 í eftirlønarlógini.

Uppskotið er eisini lagt alment út á ummælisportalin, so øll hava møguleika at senda inn ummæli.

Møgulig ummæli ella ummælisskriv skulu sendast til fmr@fmr.fo í seinasta lagi 03.10 2025.

Vinaliga / Kind regards

Bára Michelsen
Samskipari / Coordinator

Office: +298 352020
Mobile: +298 552030
bara@fmr.fo

Fíggjarmálaráðið
Ministry of Finance
Tinganes
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Office: +298 352020
www.fmr.fo